

## Carew gjørdi bart

Fyri tveimum vikum síðani flutti norski álopsspælarin John Carew frá franska felagnum Lyon til enska felagið Aston Villa, og leygardagin spældi Carew fyri fyrstu ferð á heimavøllinum hjá Aston Villa. Har treivst hann væl, tí hann skoraði einasta málið í dystinum, tá ið Aston Villa vann 1-0 á West Ham. West Ham trýsti ófført í seinna hálvleiki, men Aston Villa kláraði at halda tætt til dystarlok.

## FCK missir Laudrup

Næsta ættarliðið av Laudrup-fótbóltsspælarum er við at koma fyri seg. Mats Laudrup, sum er sonur Michael Laudrup, flytir nú helst úr FC Keypmannahavn og út um Danmark at spæla. BT skrivar, at bæði Barcelona og PSV Eindhoven eru áhugað í at gera sáttmála við unga danska spælaran. Í Barcelona skal Laudrup spæla fyri eykaliðið, meðan PSV lokkar við einum kjansi á besta liðnum hjá felagnum beinanvegin.

# Staðfesting av valdsbýtinum í Premier League

**26. leikumfar av varð spælt um vikuskiftið, og talan var um eina staðfesting av valdsbýtinum í enskum fótbólti. Chelsea og serliga Manchester United eru ikki til at steðga, meðan bæði Liverpool og Arsenal spældu javnt og mistu enn eitt fet í royndini at fylgja oddinum**

PREMIER LEAGUE
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Chelsea er farið at líkjast sær sjálvum aftur. Leygardagin vunnu teir 1-0 á Charlton, og ikki minst var hugaligt at síggja, at John Terry nú aftur var á liðnum*

*Mynd: Scanpix*

Seinasti dysturin í hesum umfarinum, var seinnapartin sunnudagin, tá Tottenham legði gras til uppgerðina millum teir og oddaliðið Manchester United. Tottenham hevur ikki fingið tað burtur úr dystunum higartil í ár, sum teir annars høvdu ætlað, og í so máta fingu teir slett yvirhøvur einki burtur úr móti Manchester United.

Fýra mál og fýra ymsir skjúttar. Tað í sjálvum sær er ein staðfesting av, hvussu væl kollektivið hjá teimum reyðu riggar. Ronaldo setti hol, tá hann fekk eitt meiri enn hálvbíligt brotsspark, sum hann sjálvur setti í netið. Vidic drønstútaði bóltin í málið eftir hornaspark, Scholes økti til 3-0 og Giggs slerdi sigurin fastan, tá hann einsamallur við málverjanum skoraði.

### Chelsea funnið stevið

Chelsea hava ikki verið eins sannførandi í ár sum farna kappingarár, tá teir trumlaðu alla mótstøðu niður. Chelsea hevur júst verið í einum minni aldudali, har teir hava spælt sær av við nøkur stig. Nú eru teir við at finna stevið aftur, og við einsamalla málinum frá Lampard, tryggjaði Chelsea trý stig aftrat og gera teir alt teir eru mentir fyri at fylgja Manchester United og fremsta plássinum.

### Eitt í part til teir næstbestu

Hini bæði liðini, sum so gjarna vilja kappast við Manchester United og Chelsea í oddinum, men kortini ikki megna tað, eru Liverpool og Arsenal. Hesi bæði fingu ikki meiri enn eitt stig í part burtur úr teirra royndum um vikuskiftið.

Liverpool tók ímóti Everton í tí sum í Onglandi best er kent sum Merseyside-derby – slagið um Liverpool. Hetta gjørdist tó ongantíð nakað veruligt slag um nakað sum helst, tí Everton vóru meiri enn nøgdir við eina stigi teir høvdu frá dystarbyrjan, meðan Liverpool ikki megnaði at spæla seg ígjøgnum sterku verjuna hjá teimum bláu, og tí endaði dysturin málleysur 0-0.

Tá var meiri ferð yvir dystinum millum Middlesbrough og Arsenal. Hesin endaði eisini við javnleiki, men tvey mál fullu og ferð var yvir dystinum. Arsenal var nakað betri og raskari, men hóast onkrar fínar kjansir, so fingu teir ikki bóltin í netið. Tað gjørdi Yakubu hinvegin fyri Middlesbrough, tá hann sjálvur var feldur, fekk brotsspark og skoraði.

Arsenal helt tó áfram at trýsta, og tá eitt korter var eftir at spæla, bragdaði umsíðir hjá teimum. Henry tók ímóti eini langari sending, tamdi væl og smekkaði bóltin í netið til endaliga úrslitið 1-1.

Aston Villa hevði ein nýggjan mann á teirra liðið leygardagin. John Carew var við teimum og hann gjørdi akkúrat tað, sum ein áleypari skal gera. Hann skoraði eitt mál, og tað tryggjaði Aston Villa trý stig.

Fulham vann 2-1 á Newcastle. Um tað var óvæntað ella ikki, er ilt at meta um, tí tað er ein sannroynd, at tað er ógjørligt at meta um, hvat man kann rokna við av teimum. Men burtursæð frá tí, endaði restin av dystinum sum væntað.

## Úrslit, Premier League

| | |
|---|---|
| Tottenham - Manchester United | 0-4 |
| Middlesbrough – Arsenal | 1-1 |
| Liverpool – Everton | 0-0 |
| Aston Villa - West Ham | 1-0 |
| Manchester City – Reading | 0-2 |
| Wigan – Portsmouth | 1-0 |
| Watford – Bolton | 0-1 |
| Fulham – Newcastle | 2-1 |
| Charlton – Chelsea | 0-1 |
| Blackburn - Sheffield United | 2-1 |

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 26 | 20 | - | 3 | - | 3 | 61 | 18 | 43 | 63 |
| 2 Chelsea | 26 | 17 | - | 6 | - | 3 | 45 | 19 | 26 | 57 |
| 3 Liverpool | 26 | 15 | - | 5 | - | 6 | 39 | 17 | 22 | 50 |
| 4 Arsenal | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 46 | 21 | 25 | 46 |
| 5 Bolton | 26 | 13 | - | 5 | - | 8 | 30 | 27 | 3 | 44 |
| 6 Reading | 26 | 12 | - | 4 | - | 10 | 39 | 34 | 5 | 40 |
| 7 Portsmouth | 26 | 10 | - | 8 | - | 8 | 34 | 25 | 9 | 38 |
| 8 Everton | 25 | 9 | - | 9 | - | 7 | 31 | 23 | 8 | 36 |
| 9 Blackburn | 26 | 10 | - | 4 | - | 12 | 30 | 37 | -7 | 34 |
| 10 Newcastle | 26 | 9 | - | 6 | - | 11 | 32 | 35 | -3 | 33 |
| 11 Tottenham | 25 | 9 | - | 6 | - | 10 | 29 | 36 | -7 | 33 |
| 12 Middlesbr. | 26 | 8 | - | 8 | - | 10 | 30 | 30 | 0 | 32 |
| 13 Aston Villa | 26 | 7 | - | 11 | - | 8 | 28 | 31 | -3 | 32 |
| 14 Fulham | 26 | 7 | - | 11 | - | 8 | 28 | 39 | -11 | 32 |
| 15 Man City | 25 | 8 | - | 6 | - | 11 | 19 | 30 | -11 | 30 |
| 16 Sheffield Utd. | 26 | 7 | - | 6 | - | 13 | 22 | 35 | -13 | 27 |
| 17 Wigan | 25 | 7 | - | 4 | - | 14 | 26 | 41 | -15 | 25 |
| 18 West Ham | 26 | 5 | - | 5 | - | 16 | 18 | 41 | -23 | 20 |
| 19 Charlton | 26 | 5 | - | 5 | - | 16 | 20 | 45 | -25 | 20 |
| 20 Watford | 25 | 2 | - | 9 | - | 14 | 14 | 37 | -23 | 15 |

**Enska League One**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Oldham | 30 | 16 | - | 7 | - | 7 | 50 | 27 | 23 | 55 |
| 2 Scunthorpe | 30 | 15 | - | 10 | - | 5 | 45 | 24 | 21 | 55 |
| 3 Nottm Forest | 30 | 15 | - | 8 | - | 7 | 38 | 28 | 10 | 53 |
| 4 Bristol City | 29 | 15 | - | 7 | - | 7 | 41 | 28 | 13 | 52 |
| 5 Yeovil | 30 | 14 | - | 9 | - | 7 | 37 | 25 | 12 | 51 |
| 6 Swansea | 30 | 13 | - | 8 | - | 9 | 47 | 33 | 14 | 47 |
| 7 **Blackpool** | 29 | 13 | - | 8 | - | 8 | 44 | 33 | 11 | 47 |
| 8 Doncaster | 29 | 12 | - | 10 | - | 7 | 37 | 26 | 11 | 46 |
| 9 Tranmere | 31 | 12 | - | 10 | - | 9 | 37 | 30 | 7 | 46 |
| 10 Carlisle | 31 | 13 | - | 7 | - | 11 | 34 | 37 | -3 | 46 |
| 11 Hudddersfield | 31 | 10 | - | 11 | - | 10 | 40 | 45 | -5 | 41 |
| 12 Crewe | 30 | 11 | - | 5 | - | 14 | 48 | 52 | -4 | 38 |
| 13 Gillingham | 31 | 11 | - | 5 | - | 15 | 40 | 55 | -15 | 38 |
| 14 Bradford | 31 | 9 | - | 10 | - | 12 | 35 | 38 | -3 | 37 |
| 15 Port Vale | 30 | 11 | - | 4 | - | 15 | 34 | 39 | -5 | 37 |
| 16 Brighton | 30 | 10 | - | 6 | - | 14 | 34 | 41 | -7 | 36 |
| 17 Millwall | 30 | 10 | - | 6 | - | 14 | 34 | 41 | -7 | 36 |
| 18 Chesterfield | 30 | 9 | - | 8 | - | 13 | 33 | 35 | -2 | 35 |
| 19 Northampton | 30 | 8 | - | 11 | - | 11 | 28 | 33 | -5 | 35 |
| 20 Leyton Orient | 30 | 8 | - | 10 | - | 12 | 39 | 47 | -8 | 34 |
| 21 Cheltenham | 31 | 9 | - | 5 | - | 17 | 30 | 44 | -14 | 32 |
| 22 Bournemouth | 30 | 7 | - | 10 | - | 13 | 29 | 43 | -14 | 31 |
| 23 Brentford | 31 | 5 | - | 11 | - | 15 | 25 | 51 | -26 | 26 |
| 24 Rotherham * | 30 | 9 | - | 8 | - | 13 | 41 | 45 | -4 | 25 |

Føroyskir spælarar Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

*) Rotherham byrjaði árið við 10 minusstigum. Hetta tí felagið er sett undir umsiting

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 304 | 244 | 60 | 14 |
| 2 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 321 | 255 | 66 | 13 |
| 3 VB | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 296 | 295 | 1 | 8 |
| 4 StÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 266 | 341 | -75 | 4 |
| 5 Kyndil | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 278 | 330 | -52 | 2 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 456 | 419 | 37 | 14 |
| 2 Kyndil | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 434 | 420 | 14 | 11 |
| 3 StÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 403 | 396 | 7 | 11 |
| 4 KÍF | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 403 | 413 | -10 | 11 |
| 5 Neistin | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 456 | 442 | 14 | 9 |
| 6 H71 | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 413 | 475 | -62 | 6 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 15 | 11 | - | 4 | 38 | 25 | 13 | 15 |
| 2 SÍ | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 24 | 11 | 14 |
| 3 Dráttur | 15 | 9 | - | 6 | 34 | 29 | 5 | 11 |
| 4 TB | 15 | 8 | - | 7 | 30 | 23 | 7 | 10 |
| 5 KÍF | 15 | 5 | - | 10 | 28 | 33 | -5 | 8 |
| 6 Mjølnir | 15 | 2 | - | 13 | 11 | 42 | -31 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 12 | 11 | - | 1 | 33 | 13 | 20 | 15 |
| 2 Mjølnir | 12 | 9 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 12 |
| 3 Fram | 12 | 6 | - | 6 | 23 | 24 | -1 | 8 |
| 4 Fleyr | 13 | 4 | - | 9 | 19 | 31 | -12 | 6 |
| 5 SÍ | 13 | 1 | - | 12 | 18 | 38 | -20 | 1 |